Andras Róin:

# Helst breiðan eigaraskara

**– Tað vildi verið ein fyrimunur, at ein breiður - føroyskur og útlendskur - eigaraskari eigur Føroya Tele saman við møguligum strategiskum íleggjara, sigur Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele**



*Stjórin fyri Føroya Tele heldur tað vera ein fyrimun við breiðum eigaraskara til eitt einskilt Føroya Tele*

EINSKILJING
*Heri á Røgvi*
*heri@sosialurin.fo*

Hann er varin við at úttala seg.

Stjórin fyri Føroya Tele samtakið hevur í fleiri ár tosað um, hvussu alstóran týdning tað hevur at Føroya Tele verður einskilt. Sambært vegleiðandi tíðarætlanini, so skal Føroya Tele seljast í 2006 og í 2008. Tað vil siga í tveimum umførum, men tað verður ikki í teirri umtalaðu tíðarætlanini sagt nakað um, hvussu nógv verður selt í hvørjum umfari, og hvussu sølan skal ganga fyri seg.

Tað týdningarmesta fyri Andras Róin er, at Føroya Tele verður einskilt - og heldur fyrr enn seinni. Tað hevði sambært Føroya Tele stjóranum rigga væl við breiðum eigaraskara.

– Tað vildi verið ein fyrimunur, at ein breiður - føroyskur og útlendskur - eigaraskari eigur Føroya Tele saman við møguligum strategiskum íleggjara, sigur Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele.

## Skipa søluna

Eitt lógaruppskot verður lagt fyri løgtingi í sambandi við hvørja av teimum ætlaðu einskiljingunum. Enn er einki tílíkt uppskot komið niðan í løgtingi, men sambært løglistanum verður tað í hesari tingsetuni.

– Eg gangi útfrá, at vit í næstum skulu á fund við politiska myndugleikan um, hvussu einskinjingin av Føroya Tele skal skipast, sigur Andras Róin. Hann heldur tað vera ov tíðliga at siga serliga nógv um tíðarætlanina í ólavsøkurøðuni hjá løgmanni. Stjórin fyri Føroya Tele metir tíðarætlanina hjá landsstýrinum sum eitt fyrsta útkast.

– Vit hava verið klárir at einskilja Føroya Tele í longri tíð, og tað kundi verið í fyrru helvt av 2006, um tað skuldi verið, sigur Andras Róin.

Einki prospekt, t.e. upprit til møguligar keyparar, er gjørt, men hetta vildi ikki verið nøkur drúgv uppgáva, heldur Andras Róin.

## Merkja áhuga

Í grannalondunum hava ymsir leistir verið royndir í sambandi við einskiljingina av almennum fjarskiftisfyritøkum. Tó hevur meginreglan verið, at ein breiður eigaraskari er skipaður. Tað merkir, at tað ikki hevur verið vanligt sum so at selja til eina fyritøku. Í føroyskum høpi kundi ein strategiskur íleggjari eitt nú verið danska TDC, sum kundi hugsast at keypt Føroya Tele og rikið tað sum ein part av sínum samtaki.

Í øllum førum bilar tað ikki við áhuga, um vit skulu trúgva teimum á Føroya Tele.

– Vit merkja javnan áhuga fyri Føroya Tele frá bæði útlendingum og føroyingum, sigur Andras Róin.

Ein einskiljing vil sjálvandi eisini merkja eina broyting fyri føroyska fjarskiftisrisan.

– Tað er givið, at ein og hvør nýggjari eigari vil royna at vinna so nógvan pening sum gjørligt burtur úr sínari íløgu. Tað vil sjálvandi eisini merkja broytingar á Føroya Tele, tá fyritøkan verður einskild, sigur Andras Róin.

Føroya Tele hevði í fjør 34,5 milliónir í yvirskoti. Fyrsta hálvár í ár hevur hilnast betur enn sama tíðarskeið í fjør. Eginpeningurin er 320 milliónir, so tað burdi tað almenna í øllum førum fingið inn fyri sítt fjarskiftisfelag.

---

Johan Dahl ótolnast:

# Neyðugt at skúgva embætisfólkini til viks

**Tingmaður Sambandsfloksins, Johan Dahl, heldur tað er alneyðugt, at arbeiðið við at fáa kummuleringsavtaluna við ES og fríhandilssáttmálan við Russland upp á pláss skjótast gjørligt. Hann mælir løgmanni til at fara út um føroysku embætisfólkini og sjálvur fara til Russlands og Brússel fyri at fáa málini loyst**

POLITIKKUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Vinnan og føroyska samfelagið hevur ikki ráð at bíða longur eftir, at avtalurnar koma upp á pláss. Ruslandsavtalan er alneyðug fyri okkara pelagisku vinnu, meðan kummuleringin er alfa omega fyri fiskivinnuna á landi.

Vinnulívsmaðurin og løgtingsmaðurin, Johan Dahl, heldur tað gongur alt ov seint við at fáa fríhandilsavtaluna við Russland og kummuleringsavtaluna við ES upp á pláss. Hann mælir til, at politiski myndugleikin fer út um føroysku embætisfólkini og fær avtalurnar endaliga í lag.

– Sjálvandi skal politikarin lata embætisfólki gera síni ting. Kortini kunnu embætisfólkini bert samráðast til eitt vist, og so fer í baklás. Arbeiðið hevur drigið so nógv út, at eg haldi, at tíðin nú er búgvin til, at málini fara á politiskt stig fyri at seta ferð á tilgongdina, vísir formaðurin í uttanlandsnevndini á.

Johan Dahl heitir á løgmann um at taka dokumentmappuna undir armin og fara til Russlands og Brússel fyri at fáa avtalurnar upp á pláss, sum hann málber seg.

– Vit kunnu ikki áhaldandi fyrigykla og fortelja okkara vinnu, at nú og nú verður tað, tí einki hendir. Tú mást ikki gloyma, at vinnan bíðar og keypir kanska inn eftir tí, hon verður lovað, og tað tað kunnu vit ikki bjóða okkara vinnu, sigur Johan Dahl.

Vit royndu fyrrapartin at fáa eina viðmerking frá Uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, men tað eydnaðist tíverri ikki.



*Johan Dahl, løgtingsmaður*